# Adrian kosin besti maður

**U-15 landsliðið megnaði ikki at vinna í finaluni, men ein av føroysku spælarunum varð kosin besti maður**

U LANDSLIÐINI
*Jóannes Hansen*

Leygarkvøldið komu U 15 og U 17 landsliðini aftur úr Aberdeen, har tey í síðstu viku vóru við í altjóða kappingum. Tað vóru bara føroyingar, sum vóru umboðaðir av landsliðum. Hinir luttakararnir vóru felagslið.

U 15 landsliðið rakk finaluni, har teir leygardagin taptu 3-0 ímóti Aberdeen. Fríggjadagin kvalifiseraðu teir seg til finaluna, tá ið teir vunnu 2-1 ímóti Albion. Føroyar vóru aftanfyri 1-0, tá ið bara ein lítil løta var eftir. Men so javnaði Adrian Cieslewicz, og í fyrra hálvleiki í longdu leiktíðini skoraði Jóan Símun Edmundsson føroyska sigursmálið.

Hóast Føroyar taptu finaluna, so vóru føroyingarnir ikki heilt eiðasørir. Adrian Cieslewicz, sum í Aberdeen enn eina ferð vísti, at hann hevur framúr fótbóltsevni og er sannur brandur í málskjótingini, varð kosin besti spælari í kappingini.

Sum tað var nevnt í síðstu viku, so hevur Adrian ikki fótbóltseevnini frá fremmandum. Beiggin, Lukasz, spælir ungdómsfótbólt í Brøndby, og pápin, Robert, var í síni tíð stinnur í ÍF álopinum og seinni í VB og Sumba.

Tað er einki at ivast í, at navnið Adrian Cieslewicz í síðstu viku varð skrásett í fleiri lummabókum hjá teimum, sum vegna fótbóltsfeløg kring Europa hava til arbeiðis at finna nýggjar spælarar.

U 17 landsliðið endaði á fimta plássinum. Dundee United vann finaluna 2-0 ímóti einum øðrum skotskum liði, sum eitur Dyce BC. Áhugavert er í hesum sambandinum, at ein av spælarunum á liðnum hjá Dyce BC hevur djúpar røtur í Føroyum. Hann eitur Oddmar Færø, og hann er sonur Annu Mariu og Oddmar Færø, sum búgva í Aberdeen.

Fótbóltsevnini liggja í familjuni. Pápin, Oddmar, spældi í 1980 seks ferðir á danska U 17 landsliðnum, og umframt í fleiri dystum í áttati árunum, áðrenn Føroyar gjørdust limir í FIFA, so spældi hann ein altjóða skrásettan landsdyst. Tað var á Kypros flaggdagin í 1993. Í 1992 og í 1993 umboðaði Oddmar B68. Frammanundan hevði hann spælt í fleiri ár í B36.

Eisini abbin, Oddmar Færø, var í síni tíð góður fótbóltsspælari. Hann spældi nógv við B36, og hann var tríggjar ferðir á landsliðnum - í 1961, 1968 og í 1969.

Nú eru avbjóðingarnar hjá U 15 landsliðnum fyri í ár loknar. U 17 landsliðið skal luttaka bæði í NM og EM. NM kappingin verður í Reykjavík í næstu viku.



*Adrian Cieslewicz, ið dagliga spælir við VB, varð kosin besti leikari í kappingini, sum U-15 landsliðið hevur luttikið í í Aberdeen*

*Mynd: www.football.fo*

# Todi tapti fyrstu royndina

**Todi spældi í ellivu minuttir, tá ið fjarstøðan frá Start og aftur til tey næstu mánakvøldið tødnaði til trý stig**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað er ikki so ógvuliga langt síðani, at fleiri føroyingar vóru í bestu norsku deildini. Síðani Jákup Mikkelsen fór úr Molde, hevur tað verið øskukalt. Men mánakvøldið tók Todi Jónsson tráðin upp eftir føroyingarnar, sum umframt Jákup hava verið Kurt Mørkøre, Julian Johnsson og Hans Fróði Hansen.

Todi var á vøllinum í ellivu minuttir, tá ið Start á útivølli í Lillestrøm tapti 2-0. Harvið minkaði munurin frá oddaliðnum Start, sum hevur 30 stig eftir fjúrtan tey fyrstu umførini, og aftur til Vålerenga úr Oslo og Viking úr Stavanger niður í trý stig. Við sigrinum tók Lillestrøm seg upp á 24 stig.

Todi var við í samanspæli, men hann hevði ikki royndir ímóti mótstøðumálinum. Í 2. hálvleiki legði Start stórt trýst á fyri at taka tað aftur, sum teir mistu miðskeiðis í 1. hálvleiki, tá ið Lillestrøm skoraði upp á fríspark.

Start hevur í ár verið tiltikið fyri sínar endaspurtir. Men hesa ferð eydnaðist tað ikki at fáa mál. Ikki minst tí 41 ára gamli týski málmaðurin hjá Lillestrøm, Claus Reitmaier, sum hevur spælt fleiri enn trý hundrað ferðir í bundesliguni, stóð seg so framúr væl.

Tað sama varð ikki hildið um Rune Nilssen í Start málinum. Hann hevur í trettan teimum fyrstu umførunum verið sannur brandur, men mánakvøldið varð mett, at hann átti sín lut í báðum Lillestrøm málunum. 2-0 málið varð skorað í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Málverjin fór langt út í brotsteigin eftir bóltinum, sum hann vann í kapping við mótstøðumann. Men ólukkutíð fyri Start, so misti hann bóltin, og so var tað lætt hjá heimaliðnum at staðfesta sigurin.

Í Noregi varð tað eftir dystin nógv tosað um, um Start nú fór at skrædna, og um tað ikki fór at bera til at halda fram við stóra íbléstrinum, sum venjarin, Tom Nordlie, er kendur fyri at megna at geva liðunum, sum hann hevur ábyrgdina av. Kortini varð mett, at seinna umfarið í Lillestrøm ikki bar boð um, at tað fer at ganga skeiva vegin.

Lillestrøm er vandamikið á heimavølli. Har hava teir í ár vunnið seks ferðir, og bara ímóti trettan falda meistaraliðnum Rosenborg, sum er tólv stig aftanfyri Start, hava teir ikki fingið fulla úrtøku. Tann dysturin endaði við javnleiki.

Todi Jónsson kappast við Ben Wright, sum hann mánakvøldið loysti av, og Stefan Bärlin, sum ikki var við mánakvøldið, um plássið sum miðframherji. Venjarin segði mánadagin, at tað krevst tíð hjá Toda at venja seg við spælskipanina hjá Start. So fæst at síggja, um Todi Jónsson verður ímillum teir fyrstu ellivu, tá ið Start sunnudagin heima í Kristiansand fer at fáa vitjan av Molde - gamla felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, sum nú stríðist fyri at varðveita plássið í bestu deildini.



*Todi Jónsson fekk sínar fyrstu minuttir á besta liðnum hjá Start mánakvøldið Savnsmynd*